**Landsfelag Pensjónista**

# Ársroknskapur 2016

## Átekning leiðslunnar

Nevndin hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2016 fyri Landsfelag Pensjónista.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2016, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 2016.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Tórshavn, hin 12. apríl 2017

Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Arne Thorsteinsson<br>formaður | Ingeborg Vinther<br>næstformaður | Inna Nattestad |
| Alma Petersen | Maria Olsen | |

## Grannskoðanarátekning

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Landsfelag Pensjónista fyri 2016.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

### Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin er eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 2016.

Tórshavn, hin 12. apríl 2017
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
*statsaut. revisor*

# Rakstrarroknskapur 2016

| kr. | | 2016 |
|---|---|---|
| **Inntøkur** | | |
| Landskassastuðul | | 450.000 |
| Limagjald | | 24.736 |
| Aðrar inntøkur | | 49.443 |
| | | 524.179 |
| **Útreiðslur** | | |
| Lønarútreiðslur | | -272.165 |
| Fundarpeningur | | -24.000 |
| Nevndarútreiðslur | | -27.394 |
| Bókhald, uppsetan og grannskoðan 2016 | | -15.000 |
| Húsaleiga | | -46.900 |
| Aðalfundur | | -9.226 |
| Skrivstovuhald | | -15.142 |
| Telefon | | -3.214 |
| Postgjald | | -180 |
| Luttøka, tiltøk | | -5.000 |
| Gávur, heiðursmerki og umboðan | | -2.226 |
| Uttanlanda samstarv | | -28.700 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | | -11.605 |
| Blaðið Eldri | | -33.587 |
| Formansfundur | | -5.146 |
| Temafundur | | -2.219 |
| Bankakostnaður | | -1.190 |
| Heimasíða | | -4.850 |
| Aðrar útreiðslur | | -1.875 |
| **Útreiðslur til samans** | | -509.619 |
| | | |
| **Úrslit av vanligum rakstri (at flyta til framfluttan vinning)** | | 14.560 |
| | | |
| **Serlig limatiltøk:** | | |
| | | |
| ***Ársveitsla*** | | |
| Inntøkur | 53.130 | |
| Útreiðslur | -63.837 | |
| | -10.707 | -10.707 |
| ***Eldradagar*** | | |
| Inntøkur | 117250 | |
| Útreiðslur | -110.035 | |
| | 7.215 | 7.215 |
| **Úrlit av serligum tiltøkum (at flyta til serlig limatiltøk)** | | -3.492 |
| | | |
| **Ársúrslit** | | 11.068 |

# Fíggjarstøða 31. desember 2016

| kr. | 2016 |
| --- | --- |
| **OGN** | |
| Eik 130.043.3 | 277.625 |
| Eik 155.005.7 (serlig tiltøk) | 14.574 |
| Áogn | 4.721 |
| **OGN TIL SAMANS** | 296.920 |
| | |
| **SKYLDUR** | |
| **Eginpeningur** | |
| Framfluttur vinningur við ársbyrjan | 248.375 |
| Flutt frá ársúrslitinum | 14.560 |
| Framfluttur vinningur við ársenda | 262.935 |
| | |
| "At nýta til serlig limatiltøk" við ársbyrjan | 14.574 |
| Flutt frá ársúrslitinum | -3.492 |
| "At nýta til serlig limatiltøk" við ársenda | 11.082 |
| | |
| **Eginpeningur við ársenda** | 274.017 |
| | |
| Ognarar | 22.903 |
| | |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | 296.920 |